# Føroyski leypurin.

## Leypamál — Leypurin sum amboð.

*Eftir Jóhannes av Skarði.*

### FORMÆLI

Hetta er seinna greinin um føroyska leypin. Í hini fyrru greinini um leypin[7]) er boðað frá, at henda greinin skuldi vera í tveimum pørtum: *1. Leypamál í sambandi við onnur mál, t. d. kannubæra og fimting o. o.* og *2. Leypurin sum amboð í arbeiðslívinum.* —

Undirstøðan undir greinini eru svør uppá spurnarbløð frá 31 fólkum í 29 bygdum, umframt nakrar egnar upptekningar. Bygdirnar, ið svørini eru komin frá, eru hesar, skipaðar eftir sýslum:

| | |
|---|---|
| Norðuroya sýsla: | Árn., Ha., Ki., Kl., Ku., Mi. og Við. |
| Eysturoyar sýsla: | Ei., F., Gj., Nsk. og Ská. |
| Streymoyar sýsla: | Hall., He., Hó., Hoy., Ko., N., Nd. og T. |
| Vága sýsla: | G., Mv. og My. |
| Sandoyar sýsla: | Da., Hú., Sd. og Skú. |
| Suðuroyar sýslurnar: | Hv. og Svk. |

Myndirnar 1, 2 og 5a og b hevur Kristoffer Kristoffersen teknað, 5a eftir frásøgn Niclasar Joensen, Tórshavn<Dali; mynd 5c hevur Curt von Jessen teknað. — Tikið ljósmyndirnar hava Kári Petersen (myndirnar 4 og 9), Tage Christiansen (myndirnar 7 og 8), Líggjas Eliasen (mynd 6) og høv. sjálvur (mynd 3).

Nýttar styttingar, umframt tær ið nevndar eru í fyrru greinini), eru: Árn. = Árnafjørður; Fu. = Fuglafjørður; Ha. = Haraldssund; Hall. = Halldórsvík; Ko. = Koltur; Mi. = Miklidalur; My. = Mykjunes; Nsk. = Norðskáli; Skú. = Skúvoy; T. = Tórshavn; Ví. = Víkar.

Viðvíkjandi nøvnum á leypum og á lutum á leypum, ið nevndir eru í hesi grein, verður víst til fyrru greinina[7]).

At enda takki eg teimum, sum so beinasom hava verið mær til hjálpar, øllum teimum, sum so væl hava svarað upp á spurnarbløðini, og teim, ið annars hava latið mær upplýsingar um evnið. Og Føroya Fornminnissavni og stjóra tess, Sverra Dahl, veiti eg bestu tøkk fyri góða hjálp, lán av lutum úr savninum, og fyri allan beinan.

## LEYPAMÁL Í SAMBANDI VIÐ ONNUR MÁL, T. D. KANNUBÆRA OG FIMTING O. O.

Henda frágreiðing um leypamál er tíverri merkt av, at tilfarið til hennara er nakað lítið, fyrst og fremst viðvíkjandi uppmáldum leypum, men eisini í øðrum førum. Men høv. heldur, at meira tilfar kann fáast til vega, og verður tá møguliga vent aftur til evnið at viðgera tað meira. —

*Mál á leypum.*

Leyparnir hava verið máldir bæði í vekt — leypur av fiski vigar t. d. o. u. 100 pund — og í rúmi, og rúmeindirnar, ið nýttar hava verið, eru tunnan og partur av tunnu, skeppan og kannubærin (1 kannubæri = 3 pottar, og 48 kannubærar eru í tunnuni, sum tí er 144 pottar; 8 skeppur eru í tunnuni). Og leypurin verður nevndur eftir hesum rúmeindum soleiðis: tunnu-, trífjórðungs-, hálvtunnu-, fjórðungs- og hálvfjórðungsleypur, og við kannubæra verður hann nevndur frá tvey og tjúgu kannubæraleypi og niður í sekskannubæraleyp, og við skeppunavni veit høv. um fimmskeppuleyp og skeppuleyp.

Nú hevði verið áhugavert at vitað, hvussu verunligu

málini á leypunum svara til leypanøvnini. Tíverri loyvir tilfarið okkum ikki at siga nakað vist um hetta, ovfáar uppmátingar av leypum eru gjørdar, men tær fáu, sum til taks eru, eru settar upp á talvu 1.

Talva 1.

| | | Innrúmið sum tað átti at verið | Innrúmið sum tað er |
|---|---|---|---|
| 1. | Hálvtunnuleypur (Hú.) | 72 pottar | 75,1 pottar |
| 2. | — (Mv.) | 72 - | 74,2 - |
| 3. | Tvey og tjúgu kannubæraleypur (Mv.) | 66 - | 68,4 - |
| 4. | Tjúgukannubæraleypur (Mv.) | 60 - | 59,0 - |
| 5. | Átjan kannubæraleypur (Da.) | 54 - | 59,8 - |
| 6. | — — (Gj.) | 54 - | 57,1 - |
| 7. | — — (Mv.) | 54 - | 57,0 - |
| 8. | Seytjan kannubæraleypur (Da.) | 51 - | 53,1 - |
| 9. | Sekstan kannubæraleypur (Mv.) | 48 - | 51,8 - |
| 10. | Fjórðungsleypur (Ví.) | 36 - | 37,1 - |
| 11. | Seks kannubæraleypur (Mv.) | 18 - | 19,0 - |

Í triðja teigi á talvuni stendur pottatalið sum leypurin átti at rúmað eftir navninum, í fjórða stendur so verunliga innrúm leypsins. — Hesi tølini svara ikki heilt saman, men verunligu leypamálini tykjast at hava lyndi til at vera heldur størri, enn tey áttu at verið eftir leypanavni. Mesti munurin er við átjan kannubæraleypin nr. 5 á talvuni, og er hann har 5,8 pottar. Bert tjúgu kannubæraleypurin, nr. 4 á talvuni, er minni, enn hann átti; munurin er 1 pottur. — Um hetta nú bert er tilvild, at verunligu málini eru størri, enn tey áttu at verið, ella tað hevur verið ætlað so og hevur verið tað vanliga, kunnu vit ikki siga nakað um við hesum tilfari.

Í Suðuroy nýta teir vanliga ikki kannubæramálið, men teir hava eitt mál, sum er ókent norðan fyri Suðuroyarfjørð, hetta er fimtingsmálið. Hvussu til ber, at suðuroyingar nú einir av føroyingum hava hetta mál, ella hvaðan teir hava tað, ella hvussu gamalt tað er, hevur høv. ikki fingið uppspurt. Men nakað gamalt er tað, tí tað er so nevnt á vártingi á Sandi 18/4 1662[1]).

Støddin á málinum var tann, at 16 fimtingar gingu í heimatunnuna, men til handils= ella krambatunnuna, gingu bert 12 fimtingar. – Málið sjálvt var fýrkantaður kassi, men tílík fimtingsmál eru nú at kalla eingi eftir. Í seinni tíðum hava teir nýtt blikkkassa ella spann í staðin. Til dømis sigur frásøgumaður úr Hvalba: «Her varð brúkt ein spann, ca. 12 pottar strokið mál.» – Tvey fimtingsmál hevur høv. fingið at vita um, annað í Hovi og hitt í Hvalba. Mátini á teimum eru:

Hovsmálið: 36cm × 17 × 20,5 = 12,546 dm³ = 13,0 pottar.
Hvalbiarmálið: 22cm × 22 × 24 = 11,616 dm³ = 12,0 pottar.

Ikki eru tey heilt eins stór bæði, litur á muni. Taka vit nú hvalbiarmálið, sum er 12 pottar, og vit vita at 12 fimt=ingar eru í krambatunnuni, verður tunnan 12 pottar × 12 = 144 pottar. Men hetta er sama tunnan sum 48=kannu=bæratunnan, ið er vanliga tunnan norðanfyri. – So er spurningurin, hvussu tað ber til, at hovsmálið er so stórt, 13 pottar. Hendan spurning kann høv. ikki greiða avgjørt her, men ætlar, at tað kann koma av óneyvari uppmáting av málinum, ella at málið av misgáu er gjørt ov stórt, ella av báðum orsøkum. – Vit mugu tí ætla, at krambatunnan í Suðuroy, er sama mál sum 48=kannubæratunnan norðan=fjarða.

– – –

Men hví alt hetta um fimtingsmálið og tunnuna? Jú, í Suður, t. e. í teimum bygdum, svør eru fingin upp á spurnar=bløð: Ho., Hv. Svk., verður fimtingur nýttur sum mál á leypum, og leyparnir hava nøvn eftir fimtingi, og tveir eftir tunnu, 16=fimtingstunnu. Frá størsta byrðarleypi til smá=leypar verða teir nevndir:

| | | |
|---|---|---|
| 7=fimtingsleypur | 84 | pottar |
| 6= – | 72 | – |
| 5= – | 60 | – |
| Fjórðungsleypur | 48 | – |
| 3=fimtingsleypur | 36 | – |
| Hálvfjórðungsleypur | 24 | – |

og eiga, eftir tí, ið oman fyri er nevnt, at rúma tí pottatali, ið sett er við teir.

6-fimtingsleypurin verður í Sandvík eisini kallaður hálvtunnuleypur. Hetta navnið, eins og fimtingsnøvnini, er eftir krambatunnuni, sum tekur 12 fimtingar. Eitt sindur ósambærlig eru tí nøvnini fjórðungsleypur (4 fimtingar) og hálvfjórðungsleypur (2 fimtingar), tí her er navnið eftir heimatunnuni, ið tók 16 fimtingar.

Her skulu verða settar nakrar fáar uppmátingar av leypum í Sandvík, talva 2, og svarar rúmið á summum teirra

Talva 2.

| | | Innrúmið sum tað átti at verið | Innrúmið sum tað er |
|---|---|---|---|
| a. | 7-fimtingsleypur | 84 pottar | 86,9 pottar |
| b. | 7- - | 84 - | 80,3 - |
| c. | 6- - | 72 - | 78,9 - |
| d. | 6- - | 72 - | 81,7 - |
| e. | Fjórðungsleypur | 48 - | 48,5 - |
| f. | - | 48 - | 51,8 - |

rættiliga væl til oman fyri nevndu mál (a og e), men á øðrum minni væl (b og f) og illa (c og d).

Til at avgera um hesar óreglur eru av tilvild, og leyparnir í Sandvík yvirhøvur hava tað mál teir «eiga», ella um leyparnir yvirhøvur hava annað mál enn teir «eiga», røkkur tilfarið ikki, til tess mega fleiri mátingar av leypum verða gjørdar. — —

*Leypurin sum mál.*

Leypurin hevur verið nýttur sum mál, og hevur tá ivaleyst verið hugsað um byrðarleyp, — ella/og rossleyp. Men hetta hevur verið ógviliga óneyvt mál, ella ið hvussu er ógviliga ójavnt eftir bygdum. — Eftir svørunum upp á spurnarbløðini er innrúmið á *byrðarleypi* heilt frá 59,3 dm$^3$ og til 107 dm$^3$. — Men av 23 máldum leypum er 21 ímillum 60 og 90 dm$^3$, og av teimum aftur eru 9 ímillum 70 og 80 dm$^3$. — Tá ið nú hálvtunnan er 69,6 dm$^3$, er byrðar-

leypurin yvirhøvur toliliga á leiðini at vera hálvtunnuleypur. — *Sum nevnt niðanfyri eru rossleypar eisini ógviliga ójavnir til støddar.*

— Torv hevur verið mett, ikki mált, í mannsskurðum og bátum, og mannsskurður og bátur hava verið so og so nógvir leypar.

Men ógviliga ójavnt er leypa- ella klyvjatalið í hvørjum mannsskurði ella báti, eftir bygdum. Møguliga javnast hetta eitt sindur aftur við tað, at leyparnir, sum mett er við, eru ymisir til støddar í ymsum bygdum, so at torvrúgvan á mannsskurði ávikavist báti verður tann sama. — Men tann spurningin eru ikki líkindi til at greiða nú á sinni. Men nakran týdning má tað hava havt, at hava mannsskurðin eins stóran, tí eftir honum varð torvskattur latin, annaðhvørt við vissari nøgd av arbeiði fyri skornan mannsskurð, ella við peningi, sum hevur verið og enn er kr. 1,50.

Sum nevnt omanfyri varð kornið, øksini, borið á sornin í leypi. Her varð leypurin eisini nýttur sum óneyvt mál, so og so nógvir leypar til so og so stóran sorn. Men tað er illt at fáa heilskapaða mynd av, hvør leypanøgd av øksum, ið kravdist til at fáa t. d. tunnu aftur av sorninum, tí munurin á frásøgum úr ymsum bygdum, er so stórur, t. d.: 7 leypar (hálvtunnuleypar) á sornin, geva eina tunnu av korni (G.), men í Húsavík t. d. verður sagt, at 16—18 leypar gingu til 1 1/2-tunnusornin. — Var kornið gott, fekkst upp á seg meir av aftur sorninum, enn tá ið tað var ringt, men *tað* kann tó ikki javna um hendan munin. — Men eftir tilfarinum her hava teir so havt frá 7 og upp í 18 leypar til sornin. — Á Sandi sigast 10 leypar at vera stórur sornur[8]).

Hoyggj varð mált í leypi. Metingarbyrðin er á flestum støðum 8 leypar av hoyggj um várið. Einstakar staðir er hon 7 leypar (t. d. Hú. og Svk.); í Dali og Gásadali siga teir, at 7 vondlar ganga til metingarbyrðina. 1 vondil = stungin rossleypur við lítlum roka (Da.) = so mikið av hoyggj, sum fyllti upp í ginið, tá ið maður stóð tvørtur um tað. (G.). —

Um heystið gingu 10 leypar til metingarbyrðina, tá skroyvdi tað meira upp, — í Gásadali 11 leypar. «Teir 8 leyparnir um várið vóru betri enn teir 11 um heystið.» (G.).

Skinn av grind gekk í leypin; tá var alt við: tvøst, spik og bein. Ofta, um ikki gekk væl í, hongdu teir eina fjós av spiki niður yvir leypin. Vanligt skinn av grind hevur verið ætlað til o. u. 200 pund.

So hava teir nýtt leypin til at mála ella býta — ymist fyri ymsar bygdir — ull, tøð, tara, fisk, nótaseið og møguliga annað.

## LEYPURIN SUM AMBOÐ Í ARBEIÐSLÍVINUM

Sum við so mongum í Føroyum, ja mest øllum, er broyting komin í her við, soleiðis at leypurin, ið fylgdi manninum í øllum virki hansara, meir og meir fer at verða troðkaður burtur, og nýggj og vónandi betri amboð eru komin í staðin. Ein høvuðsorsøk til hetta eru vegirnir, sum geva líkindi til at nýta hesi amboð: rossavognin og serliga bilin. Er vegur komin til bygd, er leypanýtslan minkað, og serliga knapplig og munandi var minkanin, tá ið bilurin kom. Enn eru bygdir, sum ikki hava vegir til aðrar bygdir, og sum lítið og einki hava av veg inni í bygdini. Og her verður leypurin nógv nýttur enn (t. d. Ku., Ki.). Men eisini í tílíkum bygdum minkar nýtslan, og skulu her verða nevnd tvey amboð, ið tikin eru í nýtslu: posin og trillubøran. Serliga á vindsamum plássum er posin hentur, tí leypurin tekur so nógvan vind á seg, — tú fert upp um fjøll t. d. eftir torvi, ella millum bygda, — meira enn posin; serliga ringt er tað, tá ið leypurin er tómur; men tóma *posan* hevur tú samanballaðan undir hondini. «Tí var broytingin við at bera torv komin longu eini 20 ár, áðrenn vegurin kom» (Da.). — Og trillubøran verður nýtt nógvar staðir (t. d. Árn., Da., Ha., Svk.), t. d. at koyra tøðini út í, og henni er ofta væl koyrandi við, um eingin vegur er. — Í einstøkum størri bygdum er so rárt at síggja

mann undir leypi, at tað munnu vera tey børn og hálvvaksin, ið ikki hava sæð hann, og hini munnu eisini venda sær á, um tey síggja hann.

Í flestum førum í dagliga lívinum varð leypurin havdur á lofti, og verður her roynt at lýsa hann sum amboð í arbeiðslívinum. — Sagt skal tó verða, at reiðingin verður ikki viðgjørd her, hon verður bert nevnd.

Fyrst skal tó — aftur at tí, sum nevnt er í fyrru greinini[7]) — verða sagt eitt sindur um *fetilin.*

Og tað, sum her skal greiðast frá, er hvussu fetilin verður festur í leypin, t. e. hvussu bandið verður bundið í fetilin og í leypin. Myndirnar 1 og 2 vísa hetta.

Vanligasti mátin at binda fetilin uppá er tann, at æs verður gjørd í endan á fetlinum, og síðan verður bandið stungið ígjøgnum og bregdað um[7]). Hesin mátin verður nýttur í mongum bygdum (t. d. G., Ha., bert í skundi, Hoy., Hú., Kl., Mi., Mv., Nd., Skú.. T.). — Annar máti er hesum líkur (mynd 1 a); munurin er bert tann, at her er bregdið ikki smoygt upp um fetilin (t. d. Nd.). Vanligur máti er bregd um endan á fetlinum (mynd 1 b). Hann verður nýttur víða (t. d. F., Gj., Ha., He., Mi., Mv., Skú.); men mangar staðir er tað bert í bráfangi, hann verður nýttur; og summir taka soleiðis til, at hatta er nakað nýtt og óvandað. Men í einstøkum bygdum er tað vanligur máti (Gj.) — Ábindingarknút (mynd 1 c og d) nýta teir summar staðir (t. d. Ha., Hú., Nd., Mi.) — Í Miðvági er vanligt at binda í fetilin við kompannaknúti, um endan á fetlinum, og í Skúvoy við (mynd 1 e); og hendir seg í Miðvági, men sjáldan, við ferðastaknúti (mynd f). — Í Dali, og møguliga í onkrari bygd sunnanfjarða, verður bandið vanliga *seymað* fast í fetilin. Á mynd 1 g er puthonk gjørd í endan á fetlinum og bandið, flættað ullband, fest í hana. Mynd 1 h sýnir fetilin, eisini flættað ullband, seymaðan fastan í sjálvan fetilin.

Vanliga verður fetlabandið fest í leypin undir ovastu rim (mynd 2). Men er ovasta rimin ikki eitt sindur breið,




Mynd 1. Ymsir mátar at binda bandið í fetilin. – g. Fetil úr Dali, sjálvur fetilin 50 cm (Fms. nr. 3714). – h. Fetil úr Dali, sjálvur fetilin 56 cm (Fms. nr. 3745).

men smøl, gera summir hol mitt í næstovastu rim og binda ígjøgnum holið (t. d. He., Skv.), og undir næstovastu rim (Skú.), at fetilin skal hóska og leypurin liggja væl á bakinum. — Vanligasti knúturin, ið nýttur verður, er lykkjuknútur (mynd 2 a); teir halda, hann er so hentur, tí hann er so lættur at loysa, um fetilin skal leingjast ella styttast (t. d. Ha., Mv., Nd.). Við *b* er bandið lagt tvær ferðir um stuðulin (Mv.), og við *c* er tikið um aftur bandið uttanfyri og so knýtt við lykkjuknúti, so at bandið liggur fast um stuðulin (Hoy.). — Kompannaknútur verður eisini nýttur, hendir seg (t. d. Ha.); mynd 2 d sýnir hetta; her er fetilin eisini bundin at stuðlinum. — Mynd 2 e sýnir bandið bundið við ferðastaknúti (F., Mv., stundum av óvandafólki, T.), og á mynd 2 g er bandið knýtt við dupultum ábindingarknúti (Gj.). — *Síðan* er máti at *bregda* bandið um stuðulin, sum mynd 2 f sýnir, og festing í fetilin við bregdi um endan (Gj.) ella ábindingarknúti (Mi.). Við hesum báðum seinastu mátunum má sjálvandi bregdast um stuðulin, áðrenn fest verður í fetilin.

Tann fyrimunur er at binda fetlabandið fast um stuðulin (mynd 2 b, c, d og f), at tá marvar tað hann minni.

Tá ið bundið verður sum myndirnar 1 a, b, e og g vísa, er knúturin ymist uttan á ella inni í leypinum, oftari uttaná. Og er hann uttaná, má hann vera á ytra tátti á bandinum, tí táttinum, sum vísir út til síðis, tí annars kann hann koma at gnaga mannin í ryggin.

Enn er ein binding, tað er at leggja fetlabandið upp um stuðulin[7]). Hesin mátin verður nýttur á heldur fáum støðum (t. d. D., N., Hú.); — í øðrum bygdum leggja teir eisini við hvørt fetilin upp um stuðulin, men tað er bert so hissini til at stytta um hann. — Myndirnar 2 h og i sýna fetilin á rossleypi; hann er úr 2 cm tjúkkum tog. Togið er koyrt undir ovastu rim og tikið um stuðulin, so at tað ger eitt eygað. Á mynd 2 h er endin spíssaður í aftur, á mynd 2 i er hann rørdur aftur at aftur.




Mynd 2. Ymsir mátar at binda fetlabandið í leypin.
(h og i eru nr. 3732 a og b á Fms.).

*Viðvíkjandi torvinum.*

Ein høvuðsnýtsla leypsins var til torv, og her var nýttur vanligasti leypurin, byrðarleypurin, seksfimtingsleypurin (Svk.), torvleypurin. Onkustaðni hevur viðhvørt verið nýttur tættleypur. Torvtíðin fellur ímillum váringina og innheystingina, t. e. frá seinna parti av mei, tá ið farið varð at skera og til ólavsøku; — tá roknaðu teir við, at allir vóru lidnir at laða. Ymist er sum bygdirnar hava verið góð ella ring torvpláss: gott, nógv og høgligt torv ella ringt, lítið og óhøgligt. Og hetta hevur verið avgerandi fyri, hvussu lætt ella tungt torvarbeiðið hevur fallið.

Tá ið farið varð at skera, varð leypurin havdur við heiman til at hava í viðføri: mat, klæði, brenni og búnyttur til at gera drekka við — um tey vóru burtur á heiðini allan dagin — og møguliga eisini hakan og torvskeran í leypinum, ella *teir* vóru havdir undir hondini. Heim aftur um kvøldið varð so borið eitt sindur av torvi í leypinum. «Ella *molar* (= konglar av nýggjum torvi), harav molaleypur = leypur við molum. Molaleypur varð borin uttan roka. At bera rokaleysan leyp hava tey kallað «at bera rug»» (Nsk.). Tað tú hevði heiman, varð so lagt oman á torvi í leypinum. — Var høgligt torvið, stuttur torvvegur, varð sjálvandi minni viðføri havt í leypinum «. . . t. d. høvdu tey ikki mat við» (Hoy.). «Bert *ein* leypur varð havdur við til viðføri, og lítil« (Kl.). — «Vóru fleiri fólk, høvdu tey fleiri leypar við og bóru torv aftur» (G.). — Vit kunnu siga, at yvirhøvur, tá ið teir fóru at skera torv, høvdu teir leyp, — *líka* nógv til viðføri, sum til torvið; men sjálvandi varð altíð eitt sindur koyrt í leypin, tá ið farið varð heim. — Ein grundin til, at teir koyrdu *lítið* torv í leypin at bera heim um kvøldið, ið hvussu er á summum støðum, var tann, at menn tá vóru móðir av at hava staðið og skorið allan dagin.

Við røktini av torvinum geldur nakað tað sama, sum við torvskurðinum, at leypur varð oftast havdur við til viðføri heiman og torv heimaftur. «Tá varð torv altíð borið heim,

so at torv var heima í hoyggingini» (G.). – Summar staðir varð nýttur grótleypur at bera burtur á; tað var har ið ringur vøllur var nær við, og illt var um, so ikki bar til at nýta handbøruna» (Ha.).

Tá ið torvið var turt, varð borið saman í leypi og laðað, annaðhvørt í lut – um tað var hart í torvinum, og tað lá soleiðis fyri – krógv ella summir í gróthús. Í gróthús, el. torvhús, varð ofta reitt, har teir høvdu ross, tí tað var longri vegurin, men luturin og krógvin vóru á heiðini, tí varð *borið* hagar. Soppatorv ella garðatorv, sum tað summar staðir (Gj., F.) verður kallað, varð altíð borið í gróthúsið; hetta bæði tí at tað kravdi góðan gjóstur fyri at verða gott, og tí at hetta torvið oftast varð skorið stutt uttan fyri garðarnar – harav navnið – har gróthúsini stóðu.

Í summum bygdum varð torvið borið til báts, og so ført t. d. um Leitisvatn í Vágum, inn Borðoyarvík til Klakksvíkar og úr Skopun út í Hest. – «Tá ið teir førdu torv, sígdu teir torvið niður; tá vóru altíð tveir fetlar í leypinum, fetil hvørjumegin» (Kl.).

At fáa torvið heim var vetrararbeið og út á várið. Tað er eyðkend føroysk bygdarmynd, at maður ella menn fara við leypi á baki eftir torvi, ella koma aftur at húsum við fullum leypi. Ofta varð farið í lýsingini, áðrenn farið varð til arbeiðis, ella í skýmingini, tá ið teir góvust at arbeiða (G., Hú.). – Í summum bygdum (G., Mv.) hevur verið so siður, ella møguliga grannastevnuviðtøka, at ikki mátti verða farið eftir torvi fyrr enn ljóst var, og aftur mátti vera komið fyri ljósatendring; hetta fyri torvstuldur. – Tá hevur verið prátað, – teir vóru eftir torvi – og kann vera, at prátið hevur gingið *í* so væl undir leypi, sum annars. – Ein maður helt fyri, at hann hugsaði altíð betur undir leypi (Mv.). – Tómi leypurin hekk ofta skeivur á bakinum, og gongulagið var merkt av tí.

Hvussu ofta ið farið var eftir torvi, og nær á degi, var annars eftir líkindum. Var sjóveður, varð ongantíð borið torv, útróður gekk altíð frammum torvbering. Var aftur

ímóti gott veður á landi, men eingi útróðrarlíkindi, tá varð borið niðurfyri. Og tað mátti vera so mikið niðurfyri, at heldur ikki skuldi vera neyðugt at fara eftir torvi, tá ið óveður var. Konufólkini mundu annars bera ikki *minni* torv



Mynd 3. Maður kemur at húsum við torvleypi á baki.

enn mannfólkið (Svk.). – Altíð varð borið niðurfyri til høg-tíðir, serliga til jóla, so ikki skuldi vera neyðugt at fara eftir torvi jólanna millum (G.). – «Tann høgligasta krógvin bar navnið jólakrógvin» (Kl.). – «Áðrenn dagur var, varð farið í jólavikuni; vanliga vóru tá fleiri fólk í fylgi» (Da.). – Summum dámdi best at fara einsamallir, og vóru teir morgunmenn, var tað hjá einstøkum roysni at vera fyrstir.

Var tílíkur maður farin tíðliga av stað og møtti manni, sum kom við fullum leypi, dámdi honum illa. – «Helst vóru teir einsamallir, uttan til høgtíðir, tá høvdu teir kanska eisini eitt sindur uppi í høvdinum» (G.). – Í ringum geingi var gott at vera fleiri í fylgi, tað lætti um slóðingina.

Ógvuliga ymist er, hvussu høgligt torvið er. Í summum bygdum, har høgligast er, er gongdin aftur og fram 10–15 minuttir; men har óhøgligast er, er hon upp í 3 tímar. – Vit mundu sagt í dag, at hetta var dýrt torv, tá tað kostaði 3 arbeiðstímar at fáa ein leyp av tí til húsa. Men tey høvdu góða tíð, tey gomlu, og hvør tími varð ikki mettur í pengum.

Til eitt húsarhald hava gingið frá einum 100 til 300 leypar, og meir[6]). Var torvið óhøgligt, var tað ikki lítið at bera heim á bakinum. Torvleypur vigar ógvuliga ymist, frá o. u. 35 kg til o. u. 60 kg, ymist eftir bygdum, eftir góðsku á torvinum, tí hitt góða torvið er tyngri, og eftir monnum, sum teir løgdu á seg.

Við torvbering høvdu menn altíð roka á leypinum. Fyllt varð upp undir ovastu rim, og síðani rokin settur omaná. Tveir høvuðsmátar eru at seta rokan. Hin vanligasti mátin er hesin (mynd 4): Fyllt verður upp undir ovastu rim. Síðan velur tú tær góðar langar torvur til roka, rokatorvur, og setur síð um síð upp og niður omaná soleiðis, at størri parturin av torvuni stendur upp um kjaftin á leypinum. – Rokatorvurnar vórðu settar, torva aftur at torvu fram við framrimini, síðan fram við báðum síðum, og at enda í gloppið, sum nú var við bakrimina (Kl., Ská., Árn.). – Breiða síðan á torvunum skuldi venda aftur og fram (Mv.). – Teir, sum vildu hava meir at ganga í, brettu rokatorvurnar útfrá, at miðjan skuldi taka meir. Var torvið brotillt og smátt, vórðu rokatorvurnar bert settar fram við síðunum, og smátt fyllt upp í miðjuna. Rokin kann vera so høgur, at hann kemur upp um høvdið á manninum, og tað ræður eisini um at hava hann so ovarlaga sum møguligt; tað er fyri vøguna á byrðini. Í Tórshavn vóru byrðarleyparnir heldur smáir. Teir

raskastu laðaðu tí omaná á rokan, «og teir laðaðu tað so akkurát» (T.), og høvdu so band um rokan og bundu í rimarnar. Tað kundi vera líka nógv omaná sum í leypinum. — Smádreingirnir fylltu ofta ótætt í neðra, tí teimum dámdi



Mynd 4. Maður undir torvleypi við roka.

at hava stóran roka. — «Tað var fríggjararoysni at hava stóran roka á torvleypi, lá leiðin fram við húsunum, har gentan búði.» (Hoy.).

So er annar máti at seta rokan. Hesin rokin (mynd 5 b) verður *í* Dali nýttur *á* heiðini, tá *ið* teir bera saman, — og í Klakksvík hava *summir* menn nýtt hann, tá ið teir hava borið heim. Rokin verður settur so:




Mynd 5. a. Serligur leypur hjá monnum sum høvdu veikt høvd.
b. Serligur roki. c. Leypsjarn.

Tú fyllir upp undir ovastu rim, síðan leggur tú fýra langar torvur, á myndini merktar *a*, oman á rimarnar so⸗leiðis, at tær gera ein fýrhyrning við hornunum út av leyps⸗síðunum. Fýra torvur, merktar *b* verða nú lagdar úr horn⸗unum á hesum fýrkanti, t. e. oman á samankomingarnar av torvunum *a*, og mitt niður í leypin; tær koma so at standa eitt sindur á skák niðureftir. Síðan aftur fýra torvur, merktar *c*, á sama hátt, men ímillum tær fyrru, merktar *b*, also á leypsstuðlarnar. Nú liggur ein dupultur krossur av átta torvum oman á fýrhyrninginum av *a*⸗torvunum. Nú verða aftur átta torvur lagdar ímillum hesar átta torvurnar, og

inn ímóti miðjuni, so verða aftur torvur lagdar ímillum tær, og síðan hildið fram og laðað upp í hóskandi hædd. Hesin rokin kann gerast ógvuliga stórur, og hann er sera sterkur og hevur tann fyrimun, at hann liggur betur á fyri beringini, betur framyvir, siga teir, ið nýta hann.

*Viðvíkjandi tøðunum.*

Onnur høvuðsnýtsla leypsins var til tøðbering. Her var nýttur tøðleypur, eisini tann við leysum botni eins og ross-leypur (t. d. G). Summar staðir (t. d. Gj., T.) verður bert nýttur tættleypur.

Tøðini vórðu borin um várið, – váringin, veltingin. Fyrr var tað kornveltingin, fyrst og fremst, seinni eplini. Í hægstu veltingartíð, t. e. frá leypársmessu, 24. februar, til mariu-messu, 25. mars, varð borið ella reitt dag um dag, um tað viðraði so frægt. Men var veðrið ólagaligt, endaði veltingin seinni; seinasta sátíð var á krossmessu, 3. mei. Við epla-velting verða tøðini vanliga ikki borin á veltuna fyrr enn frá fyrst í apríl og úteftir. – Summir bóru tøð um veturin, tá ið einki annað gjørdist. «Menn, ið vóru illa ábornir við ross, bóru tøðini ávegis um veturin» (Mv.). Teir, sum høvdu ross og langan tøðveg, reiddu. Aðrir bóru ella lántu sær ross. – Í summum bygdum varð alls ikki reitt (t. d. F., Kl., N., Árn., Ki.). – Longsti tøðvegur hevur verið o. u. 2 km, so styttri og heilt niður í onga leið at kalla, tí bygdin er í bønum. Eins og við torvleypinum er ógviliga misjavnt, hvat menn hava mett ein tøðleyp til at viga, frá 30–35 kg til 60–70 kg. Og ymist er, sum menn meta saman *tøðleyp at bera* og *rossleyp til tøð;* summir siga hin fyrra at vera størri – maðurin skuldi bera klyvina, var hann góður við rossið (Hoy.) – summir hin seinna (t. d. N.), og tað sigur Svabo[2]).

Reiðingin er í øllum støðum minkað, og í flestum støð-um fallin heilt burtur. Fyrst og fremst hava vegirnir gjørt hetta, tí rossavagnur kom í staðin fyri, og serliga bilurin. Í Sandvík vóru t. d. 4–5 ross, men tá ið bilur kom til

bygdina, vórðu øll rossini dripin. — Men summar staðir kom tað afturstig, at teir sleptu reiðingini og fóru at bera (t. d. Ei.) Eisini verða fleiri staðir tøðini koyrd út á trillu-børu, har koyrandi er, eisini um eingin koyrivegur er (Árn., Ha., G. og Svk.).

*Viðvíkjandi tara, slógvi, landi, velting (umframt tøðini).*
Á taraplássum hevur tarin verið nýttur til tøð, bæði reka-tari og skurðatari. Ferskur varð hann borin í vanligum, ella stórum, byrðarleypi í tararógv. Hetta var ónossligt arbeið. — Um várið varð hann so borin, oftast í vanligum tøð-leypi, út á veltuna. Nú er henda beringin fallin burtur manga staðni, tí tarin verður ikki tikin nú sum fyrr.

Slógvið varð nýtt til tøð, summir vóru ógviliga pjøknir, at einki skuldi fara fyri skeyti. Tað var sagt um teir gomlu havnarmenninar, at teir, tá ið teir komu aftur av útróðri, fóru ikki til hús, fyrr enn slógvið var borið á trøðna. — Teir hava borið slógvið í vanligum tøðleypi, summir í tætt-leypi; og seinni í leypi við síðum úr krossviði, ella í sink-leypi. Onkur nýtti landleypin. — Mest hevur slógvið verið nýtt til at grava undir gras. — Í Kunoy brúktu teir slógvið til rottan kom, 1914; máttu so halda uppat fyri henni.

Í summum bygdum hevur land verið brúkt á bøin frá gamlari tíð, í øðrum bygdum eru teir farnir at brúka land seinni, og endiliga eru nógvar bygdir, har landið ikki verður brúkt. — Landið varð borið í landleypi; summir nýttu grótleyp við ílæti, kagga ella øðrum uppiá.

Við velting hevur leypurin verið nýttur til okkurt annað enn til tøðini, til dømis at bera eplini av veltuni um heystið, og var veltan langt frá húsum, bóru summir eisini setina út í leypi, ella teir høvdu eplakassa standandi uppi á leyp-inum. Eisini til at bera bøkkarnar úr fyrstu forini í velt-una til at fylla í síðstu forina; og til at bera áskot yvir-høvur. — Í Halldórsvík eru 2/3 av moldini í kirkjugarð-inum bornir hagar í leypi o. u. 100 m, omaneftir kortini. —

Endiliga varð grótleypurin brúktur við velting, til at bera grót til rennur.

*Viðvíkjandi korni, hoyggi, ull og gróti.*

Til korn varð leypurin brúktur at bera øksini á sornin, um riparin ikki stóð í sornhúsinum, men burturfrá. Hann varð settur undir riparan, tá ið ripað varð, og øksini duttu niður í hann. Summir nýttu størstu leypar til hetta, trí-fjórðungsleypar, aðrir nýttu vanligar leypar. — Onkustaðni høvdu teir serligan leyp til at bera kornbundini inn á. Hann var skaptur sum stórur grótleypur, serliga var fetlasíðan so ógviliga høg, og varð hann kallaður bundaleypur (N.).

Hoyggið verður borið í byrði, so her verður leypurin ikki nýttur, uttan hvat ið hendir seg (My.). — Men tá ið tey rakaðu hoysløð og sátustaðir — oftast konufólk — varð hetta borið inn í leypi, ella borið til næstu sátu, sum maður var farin undir at binda í byrðar. — Inn fyri neytini verður borið í leypi: leypurin verður væl stungin og stórur roki omaná; maðurin fevnir so um rokan og tekur hendurnar undir ovastu rim og ber framman fyri sær. Summir hava stóran leyp til hetta, men vanligt er at hava byrðarleypin. Tá ið sligið verður inn til kúnna, verður grasið borið í byrðarleypi. — Tá ið teir gjørdu heilt stóra des, høvdu teir leyp standandi mitt í desini og drógu hann við, sum upp leið, so at luftrás eftir leypinum kom at vera upp ígjøgnum desina (Mv.). — Bendlarnir til des, tá ið teir vórðu gjørdir, vóru lagdir í leyp.

Vanligt hevur verið, men ikki allastaðni, at goyma ull í leypi, og summar staðir hava teir borið ullina í leypi av rættini og heim; aðrir bóru hana í neti. Leypurin hevur eisini verið nýttur til at býta ullina á rættini. — Við tøting varð leypurin nýttur at karða uppí. — Tá ið ullin var vaskað, varð hon borin í leypi út í ánna, ella undir lækjuna, at skola. Síðan varð hon koyrd í leypin aftur at vatnrenna, — summir løgdu stein omaná. Soleiðis stóð so ullin í ein ella tveir dagar. — Og leypar vórðu nýttir til at turka ullina

í og á. — «Tá ið váringin var liðug og torvreiðingin, og rossleyparnir ikki vórðu brúktir, vórðu teir ofta nýttir til okkurt annað, t. d. til at goyma ull og skinn í á loftinum.» (Mv.).

Grót hevur dámt føroyingum væl at baksa við; bøgarðar og aðrir garðar sýna hetta, umframt annað: húsagrundir, húsaveggir, heil sethús, kráir, gróthús, hoyløður, skúlar, kirkjur o. a. Summar staðir hevur grótið verið óhøgligt; men teir fírdu ikki fyri at bera tað langa leið, tóku tað, har tað fekst, veri seg oman av fjøllum, t. d. av Nøvini við Gjógv, tí har var so vakurt grót, — ella niðan av helluni (Við.). Og tað var á grótleypi[3]). Størstu steinarnar bóru teir á berum baki, men hitt smærra á leypinum.

*Viðvíkjandi útróðri, nótakasti og grind.*

Á sjógv var leypurin ikki havdur at kalla, uttan tað kundi vera til hissini dyrging, dyrgingarleypur. Summar staðir, teir fóru til útróðrar, høvdu teir leypin við frá húsum — serliga tá ið teir fóru við snøri (Ská.) — til útróðrarskrín, roðklæði — nú oljuklæði — súlu o. a. Men teir høvdu ikki leyparnar við í bátin — kundi tó henda seg, teir høvdu agnaleyp við (Ki.) — settu teir í støðni ella inn í neystið. Hetta hevur verið ein sermerkt bygdarmynd, at síggja allar leyparnar standa í støðni onkun góðan sjódag, tá ið allir bátarnir vóru úti. Eina mest sermerkt kanska í Mikladali, har leyparnir ikki vórðu *settir* í støðni, men hongdir, teggjaðir upp á kneysar í berginum, ella kongar, har vóru settir (mynd 6); hetta var gjørt, at teir skuldu ikki taka út, um brim kom, ella fúka, tí kyrruvont pláss er og vindsamt. — Men í øðrum bygdum høvdu teir ikki leypin við frá húsum, teir fóru til útróðrar, annaðhvørt tað bert hevur verið so siður, ella *hetta* hevur loðað uppi við, at tað var ovmikið væntið at hava ílætið við til fiskin, sum svam í havinum. Nei leyparnir vórðu ikki bornir oman, fyrr enn bátarnir komu aftur, og tað gjørdu konufólkini og børnini, sum fóru oman við drekka til menninar, teir komu aftur.

Úr støðni varð so fiskurin borin til hús í leypinum, ella í handilin. — Summir, teir komu aftur, serliga har stutt var at neystunum, fóru fyrst til húsa at fáa sær heitt at drekka, og høvdu so leyparnar oman aftur við sær. — Onkustaðni var langt at bera úr støðni og til húsa, ella í



Mynd 6. Í støðni í Mikladali. Menninir eru útrónir og leyparnir teggjaðir upp á kneysar og kongar í berginum.

handilin, t. d. úr Borðoyarvík og út á Biskupsstøð, ella út í Klakksvík. Og var ikki lendandi inni á víkini, noyddust teir ofta at bera fiskin uttan av Oyri til handilin á Biskupsstøð, 2,8 km, ella úti í Klakksvík, 3,6 km. — Fiskaleypur er tyngri at bera enn torv- og tøðleypur.

Á dyrging høvdu teir vanliga ikki leyp við í bátinum. — Tó hendi seg, teir høvdu ein lítlan dyrgingar- ella seiðaleyp við, serliga til nærhendis dyrging, ella tá ið báturin var nýliga bræddur. — Við nótakast vórðu leypar brúktir at mála seiðin í (t. d. T., Kl., Ho., Ko., Mv., Svk.). Hesir vóru størri enn byrðarleypur — í Hovi var tað sjey-fimt-

ingsleypur — og serliga sterkir (T.), tóku ein fjórðing meir (Kl.). Í Koltri var tað stórur tættleypur.

Tá ið grindin var skorin upp, var leypurin aftur á lofti, at bera grindina til hús. Byrðarleypurin skuldi taka eitt skinn av grind. o. u. 100 kg, — tvøst, spik og bein — men tá var hann eisini fullur, ofta var ein fjós hongd tvørtur um leypin omaná. — At hava leyp við í grind er sjaldsamt. Í Miðvági var tað ikki sørt. Tað sigst, at miðvingur bar leyp við grind norðan av Sundi, t. e. Vestmannasundi, og til Miðvágs. Tá høvdu teir verið í grind í Vestmanna, og hann man hava havt leypin við heiman. — Tá ið grind var í Funningsfirði, róðu havnarmenn ikki norður fyri Bjørg, men fóru inn á Skálafjørð og høvdu leypar við, gingu millum Fjarða og bóru grindina aftur í bátin.

*Bjørgini.*

Í bjørgunum hevur leypurin verið nýttur við ræning, drátti og til okkurt annað, t. d. at bera í havhestaungar.

Stórfingnast man ræningin — av lomvigareggjum — vera í Skúvoy. Tað er høgtíðsdagur í bygdini, tá ið rænt verður norðri á Dalinum og Høvdanum, øll eru við, maður og kvinna og smábørnini. Og hvør maður hevur leyp við (mynd 7). Á útferðini verður borið í leypinum viðførið: matur og klæði o. tíl. — og útgerð: línur, hælir, hakkarar, o. a. Bjargalínan verður býtt ímillum menninar at bera; hóskandi bukt er ímillum teirra; summir hava hana á berari økslini, men aðrir heingja hana um leypin (mynd 8). Eggini, sum sígingarmaðurin hevur havt upp í «roðum», verða býtt ímillum mannfólkið, hvør maður fær sín part; og hann verður borin heim í leypinum. Tað er sjálvandi ymist í nøgd. Í 1953 vóru eggini av tí minsta; tá var mannsparturin 40 egg, umframt tað, sum gekk av til jørðina, sígingarmenninar, sum vóru tveir o. a. sum gekk av óbýttum. — Hetta, 40 egg, var tó stórur partur, sum annars er vant at vera, — men tað komst av, at óvanliga lítið fólk var við til ræningina hesaferð. — Summar staðir hava teir leypin

niður í bergið og draga hann upp aftur við eggjum. Tá hava teir tveir fetlar (el. bond) í honum, ein hvørju megin, at hann skal hanga beinur (Mv.). — Tá ið teir ganga upp í bergið frá í neðra, stjóra summir eggini niður í bátin í



Mynd 7. Við ræning í Skúvoy. Menn hava sett leyparnar, meðan rænt verður.

leypi; men skúvoyingar, tá ið teir ganga upp, undir Oynni, stjóra eggini í «roðum».

Til fyglingar vóru teir burtur í fleiri dagar, tá varð borin matur til teirra í leypi (Sd., Skú.).

Í lundadrátti verða eggini tikin og borin heim í leypi,

eggjaleypi. Teir høvdu so nógvar leypar við, sum teir væntaðu fong. — Helst tøðleypar (Við.) — Hesum eggjum skal farast varligari við enn við lomvigareggjunum, tí tey eru veikari. Tí løgdu teir gras ella mosa ímillum eggini, og tað galt um, at leyparnir vóru sterkir og *stívir*, so teir ikki góvu seg. — Tá ið teir taka havhestaungar í bjørg-



Mynd 8. Ræning í Skúvoy, línan verður borin.

unum (t. d. í Da.), hava teir eisini leyp at bera teir í, og til gamlan havhest (Skú.).

*Fluttningur av ymissum slag.*

Í leypi varð flutt alt handa slag ímillum bygda, ikki minst krambavørur, ella kramarhúsvørur, har ið eingin handil var, og soleiðis verður hann brúktur enn har, ið vegur ikki er til aðrar bygdir. Hetta hevur ofta verið loka-leypar, men eisini vanligur rimaleypur ella tættleypur. — Har ið flaktur fiskur varð fluttur til turkingar í fjøru, ofta við báti, bóru teir ofta í og úr bátinum í leypi; teir sum áttu grótleyp, nýttu hann. Hetta tó bert, har illa bar til at brúka fiskabøruna (Kl.). — Eisini hava teir borið seyð í leypi, annaðhvørt tí at seyðurin hevur verið veikur og ikki

hevur tolt at vera borin í fótabuginum, ella tí at illt hevur verið um at ganga, til dømis úr skor upp ígjøgnum bjargslendi. Seyðurin varð tá bundin niður og settur eftir bakendanum í leypin. Teir høvdu tá hoyggj í botninum. – Kálv hava teir eisini borið á sama hátt. – Endiliga bóru teir kol í leypi, bæði har teir sjálvir brutu sær kol til egna nýtslu, t. d. í Hvalba og á Tvøroyri; og í Tórshavn, har kolið av goymslustaðnum var koyrt út í húsini í rossavogni, men kolið stóð á vogninum í leypum, sterkum tættleypum, og var í teimum borið úr vogninum og inn. – Og annað var borið: eyrur, kavi og ísur, harav nøvnini eyrleypur og kavaleypur, o. a. m.

*Smíðtólini í leypi.*

Smíðtólini vórðu eisini havd í leypi, smíðaleypi. Hetta var ofta lokaleypur, kundi eisini vera vanligur tættleypur og viðhvørt rimaleypur. Smiðir vóru ofta burtur í øðrum bygdum og arbeiddu, tá var hent at hava amboðini í leypi.

*At bera til møtis og ávegis.*

Har langt var at ganga og vegurin brattur og tungur, varð ofta borið til møtis, hetta mundi vera lættari. Tveir kundu bera til møtis og tríggir og fýra, og fleiri, sum vegurin var langur, og sum manningin var. – Vanligast var hetta við tøðum og torvi; men eisini fisk (t. d. Kl., Gj.) o. a. bóru teir til møtis. –

Mannagongdin at bera til møtis, t. d. tveir ið bera tøð: Annar er í køstinum, fyllir uppí og fer við fullum leypi. Teir møtast á miðjari leið, *hesin* við fullum leypi, og møtir *hinum* við tómum. Teir skifta, hann ið var í køstinum fer aftur hagar við tómum leypi at fylla upp í aftur, hin ber tøðini hagar tey skulu fara, í veltuna, ella á bøin. Er bakki, steinur ella tíl. á møtingarstaðnum, seta teir frá sær har, tá er lætt at sleppa undir aftur. Men er slætt, verður tómi leypurin settur við kjaftinum niður og hin settur omaná. – Eisini kann verða farið undir leypin, uttan at hann verður

settur niður, soleiðis: A og B bera til møtis. Teir møtast, A við tómum leypi og B við fullum. A roynir at vera fyrri á møtingarstaðnum, ið hvussu er ikki seinni. A setir leypin frá sær, tekur støðu undir liðini á leypinum hjá B, tekur afturum og undir leypin og heldur honum. Nú fer B undan, meðan A heldur, og fer til hina liðina á leypinum og heldur honum tí megin á sama hátt sum A sínumegin. Nú sleppur A leypinum og fer undir hann, meðan B heldur (Kl.). – Tað var ikki óvanligt fyrr, at maður og kona bóru til møtis. – Teir hava yvirhøvur skundað sær og borið skjótt at við skiftingini. Men onkur tekur kortini soleiðis til: «Tað mundi henda við hvørt, og lættari mundi tað vera; so sótu teir og snakkaðu eina góða løtu, tá ið teir møttust» (T.).

Tá ið teir bóru til møtis, høvdu teir ofta fastar hvílingarsessir, kundi vera ein bakki ella ein steinur, sum høvdu navn. Høvundinum er tó ikki kunnugt um, at hesi nøvn sipa til, at plássið er hvílingarstaður.

Eisini bóru teir ávegis, bæði tøð og torv, har í langt var at ganga, og stoyttu miðskeiðis á vegnum. Vóru tað tøð, mátti maðurin trigda tey væl niður, so at ikki skuldi torna (Mv.).

*Konufólk og smábørn bóru leyp.*

Í Føroyum hevur verið sum í øðrum londum, at mangt tungt arbeið, sum vit í dag rokna at vera mannfólkaarbeið, tað gjørdu konufólkini. Í Føroyum man hetta lag hava hildið sær longur enn í hinum Norðurlondum, og ein orsøkin mundi vera skipsfiskiskapurin. Í eini tíð, tá ið konufólkið aðrastaðir meir og meir slapp frá «mannfólkaarbeiðinum», kom í Føroyum við skipsfiskiskapinum ein rytma í arbeiðslívið, sum nettupp gjørdi tað neyðugt at konufólkið hevði hetta arbeiðið, tøð- og torvbering o. a. — tað sum maðurin ikki fekk tíð til ta stuttu tíðina, hann var heima ímillum suðurlandstúrin og eysturlandstúrin. Henda

modernisering í fiskivinnuni kom tí heldur at leggja nýggjar byrðar á konufólki enn lætta um.

Føroyska kvinnan hevur tí, á summum støðum kanska eins nógv og maðurin, knógvað undir tøð-, torv- og tara-leypi. Leypur hennara var minni enn vanligu leyparnir, sum mannfólkið brúkti. – Maður hevur til dømis gjørt konu sínari fjórðungsleyp (Svk.). – Og hetta lagið var mangar staðir heilt til seinna heimsbardaga. Nú man broyting vera komin í her, bæði av nýggjum hentleikum og, sum maðurin segði: *av tíðarandanum*.

Eisini smábørn bóru leyp. Á summum støðum vóru smá-dreingirnir ikki meir enn 5–6 ár, teir fingu leyp; men vanliga munnu teir hava verið um 9–10 ár og eitt sindur yngri ella eldri. Og hetta var lítil leypur, sum drongurin var evnaligur. – Og smágenturnar *við* gingu undir leypi, tó at tað hevur ikki verið *so* vanligt allastaðni sum við dreingjunum, og tær fingu sínar hóskandi smáu leypar.

«Tá ið dreingir og gentur vóru um 10 ár, var góður munur í teimum til arbeiðis, siga teir eldru; og tá bóru tey leyp, men væl varð ansað eftir, at tey skuldu «bera lítið og ganga títt.»» (Kl.).

*Ymis nýtsla av leypi.*

Embætismannaflutningur. Tá ið prestur og doktari ferðaðust ímillum bygda, høvdu teir altíð leyp, lokaleyp, prestleyp, doktaraleyp við til viðføri, klæði – prestur hevði so prestakjóla – o. a., og maður ella tveir menn, flutnings-menn, vóru við at bera. – Viðhvørt kundi verða farið eftir prestleypinum kvøldið fyri, tað lætti um sunnudagin, ella tað var annar høgtíðsdagur (Hú.). – Prestleypin var van-liga einki at siga til, men ofta varð knarrað um, at dokt-araleypurin var so tungur, og ofta hevði doktarin 2 leypar. – Sýslumaðurin hevði eisini – tó ikki allar staðir – flutn-ingsmenn at bera leypin, umframt kallsmenninar (t. d. G.). – Meira sjaldsamt er, at ljósmamman hevur havt leyp; hon man ofta hava havt eskju ella skrín, í seinni tíðini tasku.

Einstakar staðir hevur hon tó havt leyp viðhvørt (t. d. Svk., Nsk.).

*At bera fólk í leypi* hevur ikki verið óvanligt, serliga ímillum bygda, mest til doktara (t. d. G., Hú., Hv., Árn., Svk.); summar staðir eru sjúk fólk borin til báts í leypi, at verða førd til doktara ella á sjúkahús. Leypurin man tá oftast hava verið grótleypur, og «ofta varð gjørt fótatræ niður úr leypinum at hvíla beinini á; tað segðist vera góður sessur» (G.). — Børn vórðu ofta borin í leypi, ikki grótleypi, bæði ímillum húsa og bygda at ferðast, tá ið barnið var um 1—2 ára gamalt. Og vanligt var — og verður gjørt enn — at mamman bar barnið við sær í leypi, hon fór til arbeiðis, t. d. burtur í torv. Viðhvørt løgdu teir fjalir ímillum niðastu rimarnar til barnið at standa á (t. d. Mv.). Eisini vórðu fjalir lagdar soleiðis, at barnið kundi sita á teimum við bakinum ímóti fetlasíðuni og fótunum á botni leypsins. — Einstakar staðir hendi seg, at barnið varð borið til dóps í leypi, t. d. í Gásadali, men tað vanliga var, eisini har, at bera í kiltingi.

*Leypurin sum «grulvigarður».* Vanligt hevur verið at hava børn standandi í leypi á gólvinum, eins og nú í «grulvigarði», — og somuleiðis at hava heimalamb inni á gólvinum í leypi, tað fyrsta meðan tað var lítið og ikki kundi fara í tjóður. Stuttligt var tá hjá smábørnunum at røkta tað, at skifta hoyggj undir tí, so tað stóð turt, leggja gras og lundasinu á skammil framman fyri tað, so at tað kundi eta út ígjøgnum rimarnar, og at geva tí at súgva; so varð eitt hvørt plaggið tveitt útyvir leypin, at tað skuldi vera myrkligt niðri í hjá tí, tí so jarmaði tað ikki so illa.

*Leypurin til spæls í kavanum.* Tá ið børn spældu úti í kavanum, høvdu tey ofta, og hava summar staðir enn, leyp til form at gera í kavakubbar til at laða við kavaborg ella kavahús, ella hvat tað var, tey gjørdu.

*At seta snøristólini føst í leypin.* Her varð leypur altíð nýttur sum ein partur av snøristólunum. Á teimum leypunum var hol í tveimum ovastu rimunum, har varð

kastið sett í, sum snaraði seinna snúðurin í tog ella snøri, ið løgd vórðu. So hvørt sum snúður kom í, styttist bandið, so leypurin mátti flytast so hvørt. Til at tyngja leypin, varð grót lagt í hann (He.).

At stoyta ljós í vatni. Tá ið tey stoyttu ljós í vatni, vóru leyparnir eisini nýttir. — «Eitt træsprek varð lagt tvørtur um miðjuna á leypinum, oman á tvær ovastu rimarnar, so har var passaligt rúm at heingja ljósapinnarnar við ljósunum á, eftir at tey vóru dripin niður í kirnuna, — til at storkna. Annar endin á ljósapinnunum varð so lagdur á rimarnar á leypinum, annar á træsprekið . . .»[4]).

Leypurin sum mál. Sí omanfyri *Leypamál.*

Leypurin sum pappírskurv o. a. Í okkara tíð er vorðið vanligt, at skrivandi menn hava leyp til pappírskurv, og snotiligari pappírskurv fært tú ikki enn lítlan fittan leyp. — Eisini verða gjørdir pinkuleypar, hóskandi til støddar at hava sigarir ella sigarettir í. Hesir eru fyrst og fremst ætlaðir útlendskum ferðamonnum til áminningar, men tú sært teir eisini á roykiborðum í Føroyum.

*Mátin at bera leyp og arbeiða við leypi.*

Hvussu leypurin verður borin á høvdinum, sæst á mynd 3 og 4. So var ymist, hvussu maðurin gekk. Hann kundi halda aðra hondina um fetlabandið, ella báðar; ella hann helt saman hendur niður á nakkan, hevði tær leysar niður framman fyri seg, ella gekk hendur í favn. — Kom hann t. d. við fullum leypi av torvi og hevði haka hjá sær, kundi hann annaðhvørt bera hakan undir hondini, og grevið frameftir-niðureftir, ella hava hann í leypinum, stungnan niðurvið bakrimum leypsins, og peiandi upp í loft; men hann kundi eisini, tá ið hann helt báðar hendur um fetlabondini, hava hakan í handakrikunum, liggjandi tvørturum framman fyri bringuni (t. d. E.).

At ansa eftir. Atburðurin, tá ið arbeitt verður við leypi, er sum vera man *eitt sindur* ymissur í ymsum bygdum

10

og hjá ymsum monnum. Men *yvirhøvur* er hann tann sami, og tað sama at ansa eftir.

Viðvíkjandi torvi. Tað ræður um at leggja torvið so hampuliga niður í leypin, at tað ikki skroyvir ov mikið upp, av tí at glopur eru í niðri í leypinum. Og ansast má eftir ikki at ripa torvurnar harðliga niður í leypin, at botn-urin skal ikki brotna; á rossaleypi var skjótt til, at knapps-bandið slitnaði. Harnæst, um ikki var so nógv til av stórum torvi, tá ikki at koyra tær størstu torvurnar niður í leypin, men goyma tær til rokan. So var at ansa eftir ikki at stúva rokan ov fast, tí tá kundi leypurin spreingjast um kjaftin, kjaftrimarnar losna í stuðlunum ella oyruni brotna. – Tá ið farið verður undir leyp – helst tá ið leypurin stendur á sløttum – og eingin er at lyfta uppá, ræður um at ansa eftir at lyfta hann beint upp og ikki draga stuðlarnar eftir jørðini, tí annars kunnu teir støkka av ella klovna. Somu-leiðis – tá ið maður setir leypin frá sær – ræður um at seta hann varliga niður, at stuðlarnir skulu ikki klovna. Setir tú rokaðan leyp frá tær, t. d. til at hvíla, er at ansa eftir, at ikki dettur oman av rokanum.

So er at tøma leypin. Tú kanst stoyta úr honum. Tá ræður um, at tú ikki letur hann detta niður, tí tá kann hann lættliga brotna, spreingjast; eisini kann hann skjótast úr horni, um ikki allir stuðlar koma niður at í senn. Nei tá má haldast eftir. Tú tekur fetilin av høvdinum og leggur hann snaraðan á høgru øksl og heldur um hann við høgru hond (vinstru, um tú ert lámur). Hina hondina hevur tú afturum og tekur um fremra stuðul tí megin og heldur eftir. Letur tú tá fyrst rokan fara, og síðan nakað afturat renna burturúr, so kanst tú sleppa honum. Tryggari fyri ikki at bróta leypin, og man vera vanligast við torvi, er at seta leypin av sær, síðan taka rokan omanav og so stoyta. Tá ið torv varð borið inn í roykstovuna, ella í køkin, var vanligt, at leypurin varð alls ikki stoyttur, men bert settur frammi við eldin og tikið úr honum, so hvørt sum brúkt varð.

Tá ið tú fyllir tøðini, er eisini ymiskt at ansa eftir. Tú mást ikki fylla ov nógv í og so trygda tøðini ov fast niður, tí so kann leypurin skrædna. Heldur ikki sláa hvíslina niður í ovastu rim, so at rimin skamfílast. Tó slepst illa undan, at hvíslin onkuntíð kemur í, og vanliga eru tí ovastu rimarnar á brúktum tøðleypi slitnar nakað niður á miðjuni[7]). Vóru tøðini bleyt, vórðu tey skumpað upp á køstagarðin fyrst, og borin t. d. dagin eftir; tá vóru tey vatnrunnin (Svk.).

Við *tøðbering* ræður um, ikki minni enn við torvbering — at ansa væl eftir, tá ið stoytt verður. Rennur torvið væl úr, tá ið tú hellir leypinum passaliga framyvir, so eru tøðini aftur ímóti meira treyð at fara, tey fara ikki uttan leypurin vendir beint upp og niður. Her er tað ein fyrimunur, at leyparnir eru vegvaksnir, tá gongur betur úr, tá ið stoytt verður. Ansast má væl eftir ikki at lata leypin dumsa, tí so skrædnar hann, men halda eftir, á sama hátt sum omanfyri er greitt frá við torvleypinum, og lata leypin koma spakuliga niðurá. Men ymist hevur kortini verið borið at: — «Tað ráddi um at stoyta beint fram av økslini» (F., Hv.,). — «Tað var at halda leypinum aftur, so at tað mesta fór burturúr, áðrenn leypurin tók» (Mi.). — «Leypurin skuldi altíð tømast, áðrenn hann kom niður at» (Kl.). — «Tá ið stoytt varð úr leypi, varð hildið um annan stuðulin, meðan fetilin var verðandi á høvdinum, og so rapaði úr. Á hendan hátt varð altíð stoytt úr leypinum, hvat so í honum var.» (Svk.).

Við hoyggj ráddi um at stinga væl, men ansast mátti eftir ikki at stinga ov fast kortini, tí tá var skjótt til at spreingja leypin. — Eisini máttu allir stuðlarnir taka niðurá, meðan stungið varð, at hann skuldi ikki skjótast úr horni. — «Einki fer verri við leypi enn hoyggj, tað spennir hann sundur» (Svk.).

Sum longu nevnt, er ymist, hvussu væl rennur úr leypinum, torv fer t. d. lættari enn tøð; eitt tað ið best man renna, er fiskur, tað er bert at hella leypinum eitt sindur

framyvir, og alt rennur úr. Teir ansaðu eftir, at fetilin skuldi ikki verða dálkaður, hongdu hann tí um annan frammstuðulin, tá ið teir settu leypin, har vátt var el. skitið. So ymissur, sum atburðurin er, tá ið arbeitt verður við leypi, so er høvuðsreglan allastaðni tann at eira leypinum, at hann skuldi ikki brotna. Teir vórðu tí so gamlir, leyp-arnir hjá dugnamonnum. (Sí bl. 147).

At hava undir. Tá ið teir bóru tøð, tara — endiliga tara (Hú.) — tvag, alt, sum væta setti úr, t. d. fisk o. a., høvdu teir altíð okkurt undir leypinum, ímóti bakinum, til ikki at dálka seg. Hetta hevur yvirhøvur verið roð, *tøðroð*. Tað var ymist, hvussu teir høvdu roðið: rakað ella rotað, barkað ella óbarkað. Rakað roð dámdi summum betur, tí tað var stívari. Summir hava havt eitt heldur óvandað roð, tunt, men tó helst stórt. Aðrar staðir hava tey helst havt gott roð til hetta (Hú.). — Eisini hava teir havt skinn, óvandað, so tað hevur verið heldur snøgt, ofta deyðseyðaskinn. Roðið varð havt ímóti leypinum, ullin ímóti bakinum. — Í seinni tíð nýta mangir oljuklæði, t. d. gamla oljusvintu, — ella eitt segldúksstykki (T.).

Hetta undirlagið, roðið ella hvat tað hevur verið, mátti vera so sítt, at tað rakk nakað niðurum leypin, niður ímóti knæsbótunum.

Roðið varð so fest aftur at framsíðuni á leypinum, og hetta varð gjørt á ymsan hátt. Summir (Da.) drógu fetla-teggjurnar ígjøgnum hol, sum vórðu gjørd í roðið og hildu á tann hátt roðnum at leypssíðuni. Vanligt hevur verið at festa bæði ovaru hornini á roðnum í ovara enda á stuðl-unum. Hetta varð gjørt t. d. við at gera hol í roðið við bæði ovaru hornini og smoyggja niðuryvir stuðulin, ella ein lykkja varð gjørd við snøri í hornini og smoygd niður-yvir; summir bundu bert snørisstubba um hornini og bundu í stuðulin. «Roðið varð fest við hálsinum upp um ovastu rim og bundnum við snøri; geirarnir vórðu festir við snøri hvør sínu megin í afturstuðlarnar» (Nsk.). — Har afturat hava roðini ofta verið fest í niðara enda á stuðlunum, ella

í botnshakarnar; summir festu eisini í miðjuna á stuðlunum. Summir hava lagt niðara enda á roðnum undir botnin og fest í niðastu rim (t. d. Mv.). Endiliga festu summir roðið ikki í leypin, men á bakið á manninum. — «Teir sum høvdu tættan leyp, høvdu einki roð» (T.).

At fara undir leypin. So var at fara undir leypin. Tað ber til at fara undir leyp, sum stendur á sløttum, maðurin setur seg niður og fer undir hann og fær reist seg. Men fittligari er at hava hann standandi á einum-hvørjum passaliga høgum. Vóru fleiri saman, lyftu teir hvør upp á annan. Hin seinasti mátti ofta seta seg niður fyri at sleppa undir leypin.

Við tøðbering varð leypurin vanliga settur á køstagarðin. Bar tað ikki til, høvdu summir gjørt sær ein pall við køstin, ella har var kanska ein bakki ella steinur, sum hóskandi var — og var tað ikki, hava teir havt okkurt annað, t. d. kassa, tunnu ella tílíkt.

Sama við torvi. Vanligt var, tá ið nakað var tikið av krónni, at laða pall av grótinum frá krónni, og flag omaná, at seta leypin á. Men var bakki, steinur ella annað hóskandi har, varð tað nýtt. Ella stóð krógvin, ella gróthúsið í brekku, bar væl til at sleppa undir undan brekkuni við ongum. — Tá ið teir bóru langt, t. d. torv, høvdu teir vissar hvílingarsessir fram við torvgøtuni; hetta var so bakki, steinur, garður ella annað; og summarstaðir hava teir verið nevndir *hvílisessurin*, og skilað til, hvar hann var, t. d. suðuri í Dali: *Hvílisessurin á Gásakrónni, Hvílisessurin á Tjóvadali* og *Hvílisessurin heima á Sýn.*

Leypurin borin tómur. Tá ið leypurin verður borin tómur, fer fetilin vanliga niður av høvdinum og verður havdur framman fyri bringuna. Men so kann vera eitt sindur ymist, hvussu borið verður: 1. Fetlabondini liggja á økslunum, og onnur hondin út í fetilin ella báðar hendur (mynd 9). 2. Annað fetlabandið liggur t. d. á vinstru øksl, hitt á høgra armi oman fyri alboga, og høgri armur stungin út í fetilin frammanfyri, sum tú hevur hondina í fatli;

vinstra hond kundi eisini halda í fetilin; (sjálvandi kundi hetta eisini vera øvugt: fetlabandi á høgru øksl o. s. fr.). 3. Fetlabondini bæði smoygd niður, so at tey liggja beint niðan fyri akslarnar, á ørmunum oman fyri alboga, og aðra



Mynd 9. Maður við tómum leypi á baki.

ella báðar hendur út í fetilin frammanfyri, – sum neyta-konur hava dyllufetilin; dugdi maðurin væl, so nýtti hvørgin hondin at fara út í fetilin, hann kundi ganga hendur í lumma, ella sum honum líkaði best. 4. Annað fetlabandið á vinstru øksl, fetilin frammanfyri bringuna, og hitt bandið undir høgru hond (ella mótsett), so kundi eisini verða

hildið um fetilin við aðrari hond ella báðum. 5. Maður tók fetilin í høgru hond, snaraði eitt lítið í og legði hann á høgru økslina (ella mótsett).

Var langur vegur at bera tóma leypin, varð oftast máti 1 nýttur, ella eisini at fetilin varð á høvdinum, sum undir fullum leypi. Var heilt stuttur vegur varð borið sum máti 5. Annars vanliga sum mátarnir 2—4. – Bar maður undir tómum leypi haka, var vanligt, um hann ikki bar hann undir hondini, vísandi á skák frammeftir-niðureftir, at hann hevði hann úti í fetlinum, t. d. við máta 2.

Eyðkent er, tá ið leypur verður borin tómur við mátunum 2, 4 og 5, at tá liggur hann skeivur á bakinum á manni.

*Klæðini.*

Kotið ella troyggjan slitust illa undir leypi, t. d. um herðarnar og um lendarnar; fetlabondini slitu eisini illa av sær niður frá økslini, serliga tá ið fetilin var langur.

Flestir fóru í tað ringasta teir áttu, ið hvussu er vásaklæði, at bera tøð og tara; hesi klæði vórðu kallað *tøðklæðini.* Ofta hevði maður serligt, gamalt kot til tøðbering. «Nú er tað vanliga gomul blusa ella yviralls» (Ku.). – Men summir gjørdu ikki mun, teir bóru í vanligu arbeiðsklæðunum. – «Tað var ikki tað besta, teir vóru í; men summir vóru so reinligir, teir kundu fyri tað verið í altarsklæðum; eiðasørt teir dálkaðu seg, um teir so stóðu í køsti við bleytum, vátum tøðum» (T.).

*Leyparnir verða røktir.*

L e y p a r n i r  v a s k a ð i r. Leypurin hevur verið føroyingum eitt so hent amboð, at tað var væl gingið um hann. – Tá ið váringin var av, tøðberingin liðug, køstarnir tømdir, vórðu tøðleyparnir vaskaðir, innan og uttan. Teir vórðu lagdir í blot í ánni, ymist hvussu leingi, alt eftir, hvussu skarpt var uppi á teimum, vanliga 1–2 dagar. Eisini veldist um, nær stundir vóru at vaska teir. Grót varð lagt í leypin,

at hann skuldi ikki fara eftir ánni. Var grunt í ánni, bloyttist bert ein síðan ísenn, hon varð so vaskað og leypurin vendur og lagdur aftur at bloyta, so *tann* síðan vaskað o. s. fr., til komið var runt; hetta vardi so fleiri dagar. Var hylur í ánni nóg djúpur, fór leypurin undir, allur sum hann var. «Hann varð floyttur og steinar lagdir í botnin, so hann sakk, og snørisendi knýttur í fetilin og festur á landi (Árn.). — Í fjøruni varð hann bloyttur allur ísenn og vaskaður» (Hoy.). — Onkustaðni hava teir tikið botnin úr leypinum, tá ið teir bloyttu teir, løgdu teir so á liðina í ánna, grót í hann, og lótu so vatnið renna ígjøgnum hann (Ve.). — Á summum leypum vóru botnfjalirnar lættar at loysa, bert teir tveir naglarnir í mittfjølini at sláa úr[7]). Og á øðrum leypum var upp aftur lættari: teir høvdu mittastu botnfjølina vegvaksna, so har nýttist bert *ein* nagli, í breiðara enda á fjølini, til at halda. — Á rossleypi hekk botnurin altíð niður frá, tá ið leypurin lá í ánni, undan streyminum. — «Nú verða leyparnir bloyttir og vaskaðir í vaskikjallara» (G.). Leyparnir vórðu vaskaðir og «skrubbaðir mest við áarslýggi og eyri» (G.). — Teir nýttu ikki sápu. Summir vaskaðu við tvøgu. Var ov tjúkt á, varð skorið við knívi. — Men sum við øllum hevur eisini her verið ymist: Summir vaskaðu væl, summir bert skavaðu innanúr, at leypurin skuldi ikki verða ov tungur (T.). — Summar staðir var siður at turka teir innan hvørt kvøld í tøðberingini, at teir skuldu ikki «klaka» innan (t. d. G., My.). — «Tá ið leypur verður ferniseraður, hevur tað púra einki at týða at hava hann reinan» (Ha.). — Tá ið tøðleypur var væl vaskaður, kundi hann verða brúktur til hvat sum helst (Hoy.). — Ikki bert tøðleypar, men eisini aðrir leypar vórðu vaskaðir, t. d. fiskaleypur og grindaleypur. — Men í fiskitíðini mátti fiskalukturin helst ikki verða skolaður av (Kl.).

Slit. Leypar sum annað slítast, og á gomlum leypum er vanligt, at nógvir partar, ofta teir flestu, eru settir í við umvæling: gamalt tikið úr og nýtt sett í staðin, ein rim nú og ein stuðul tá o. s. fr., so at lítið av tí upprunaliga

tilfarinum er eftir. – Ovastu rimarnar fara ofta av spenningini frá rokanum, oyruni losna í holinum, ella tey brotna, og leypurin gongur sundur, ella linkar; hetta eisini tá ið leypur, serliga tøðleypur, verður stoyttur harðliga. – Á tøðleypi er ovasta rim ofta slitin niður á miðjuni eftir hvíslini, sum er komin í, tá ið maður fyllti. Á rossleypi er hetta mest á frammsíðuni, tí maður stendur framman fyri rossinum, tá ið hann fyllir. – Ofta avhøvdaðu teir fiskin á støðni, tað var gjørt á ovastu rim á leypinum, og tað merkti hana (Kl.). – Á rossleypi slítst niðasta rim um knarvan.

Yvirhøvur rúmkast fyri oyrum á rimum og tøppum á botnshøkum, tá ið leypurin eldist, – og hann fer at skinkla. Teir vóru vanir at kíla rimarnar av og á. – Ikki minst skinklaði rossleypurin; – hann *skuldi* eisini vera linur, varð gjørdur linur, at hann skuldi kunna geva seg; tá ið rossini skotraðust við tómum leypum, kundu teir geva seg *so*, at teir vórðu næstan flatir (Skv.). *Tí* orðafallið: «Skinklar sum gamal rossleypur». –

Stuðlinum stendur mest á í neðra, og fara teir tí oftast har. Bæði slítist undan honum, so hann styttist – hann kann slítast heilt uppundir tappholið fyri botnshakanum, so at hann smokkar niðurúr – og eisini kann hann klovna. Vanliga fara teir aftaru stuðlarnir fyrri enn teir fremru, tí teir koma ofta fyrri niðurat, tá ið maður setir frá sær, og tað nýtur so dygt. – Stuðlarnir slítast av fetlabandinum, sum kann marva djúpt inn í teir. Er fetlabandið bundið fast um stuðulin (mynd 2 b, c, d og f), verður hetta slitið minni, enn tá ið bandið bert liggur leyst um hann (mynd 2 a, e og g). – Ovari endi stuðulsins fer eisini viðhvørt, klovnar. – Varð skrumlað harðliga niður í botnin á leypinum, t. d. stórar torvur, hendi at botnurin brotnaði, botnfjalir ella botnshakar, ella bæði. Brotnaði botnshaki, ella smokkaði niður úr tappholinum, var bráfangis umvælingin at taka snøri um niðastu rim og niður um botnshakan til at halda honum uppi.

Hólkar og spenni. Vanligt var, at menn settu horn-

hólk — seinni ofta jarnhólk — á endarnar á stuðlunum. Hólkurin var úr veðurlambshorni, skorin av endanum á horninum. Hetta var ofta gjørt longu meðan leypinum einki bagdi, til at styrkja stuðlarnar, at teir skuldu ikki slítast í neðra ella klovna í erva og neðra. — Aðrir bíðaðu við hesum, til hóttafall var komið á, stuðulin klovnaður, — til at halda honum saman. — Helst varð tað gjørt við leypar, ið nógv vórðu brúktir, serliga tøðleypar (Ha.).

Var leypur vorðin veikur av elli, farin at skinkla, varð spenni «sett á hann» (Ku.) — ella «lagt um hann» (Kl.) — til at halda honum saman. Hetta spenni var gjørt sum sagaspenni, oftast *snøri* bundið millum stuðlarnar dupult, og sprita stungin ímillum og snarað á til at spenna saman. Í gomlum døgum nýttu teir grindastreingir, t. e. sinar úr hamarstjølinum á hvali; hetta vóru bestu spenni (Ku.). — Vanligast var spenni ímillum stuðlanna í erva ella/og í neðra, — men tú sært tað eisini á miðjuni á gomlum leypi. — «Gekk leypurin sundur meðan arbeitt varð, t. d. við tøðbering, var spenni lagt á hann; tá ið so arbeiðið var av, varð leypurin umvældur rættiliga, annaðhvørt av mann-inum sjálvum ella av leypasmiði (Nsk.). Fetilin slítist eisini, hann má tí av og á verða umvældur ella gjørdur nýggjur.

Leypurin endavendur. Var leypurin illa slitin og skirvisligur, varð hann viðhvørt endavendur: Botnshaki verður gjørdur í kjaftin og botnur lagdur í, so tær slitnu kjaftrimarnar verða botnrimar, og teir slitnu stuðlaendarnir í neðra verða í erva.

Leypagoymsla. Leyparnir hava verið goymdir í onkrum úthúsi: hjalli, varðahjalli, gróthúsi, kjallara ella fjósi. — «Í fjósi, tá ið neytini lógu úti» (He.). — «. . . *ikki* í fjósi» (Ská.). — Eisini vórðu teir goymdir á einum hvørjum lofti, ella skoti, var lítil húsarúmd. — Yvirhøvur vórðu teir goymdir har, teir stóðu til minst trongrúm, — «hvar sum helst, har sum pláss var, tað var ikki meira at spekulera upp á tað» (Ha.). — Leyparnir vórðu settir, tá ið teir vórðu goymdir, ikki hongdir upp, — annað enn hendi seg — og

smáir leypar niður í teir størru at spara um plássið. – Yvirhøvur hevur ikki verið nógv trongrúm av leypunum. Teir gomlu garðarnir høvdu nógv úthúsini; hjallar og grót-hús, so tað hevur ikki bilað. – Leypar máttu helst ikki setast úti, tí teir fuku so illa.

*Aldur leypa.*

Sjálvandi er ógviliga ymist, hvussu gamlir leypar verða, har velst bæði um, hvussu væl leypurin var gjørdur, hvussu menninir vóru røkjutir, og hvussu nógv var lagt fyri leypin. – Vit hava dømi um avgamlar leypar. – Elsti leypurin á Viðareiði er torvleypurin hjá gamla Absaloni, bónda í Heimistovu á Heygum. Absalon festi 1777. Ein annar av-gamal leypur er har í bygdini, eingin veit at siga, hvussu gamal hann er. – «Elsti leypurin her í húsinum er o. u. 100 ár, hann er ofta viðgjørdur, men verður nýttur enn» (Gj.). – So er karðingarleypurin í Húsavík[7]); hann er eini 150 ára gamal. Nú er hann nóg illa nýtandi til annað enn ull at standa í, ella karða úr. – Á Norðoyri er ein 150 ára gamal leypur, lokaleypur. Ein stuðulin er brotin um tapp-holið fyri botnshakanum, og lokið er burtur, annars í góð-um standi og hevði væl verið nýtandi enn. Men síðan vegur er komin inn til Klakksvíkar, og bilar koyra ímillum, hevur hann ikki verið nýttur. – Í Gásadali er 80 ára gamal leypur. –

Annars er ógviliga ymist, hvat menn rópa leypaaldur; vanligt man vera eini 40 ár. Men tað eru fleiri menn enn í ymsum bygdum, sum nýta leypar, ið eru 50–70 ára gamlir og sum nevnt einstakir upp í 100 ár; aðrir kalla leyp gamlan, tá ið hann er 20–30 ár.

*Leypaamboð og leypasmiðir.*

L e y p a a m b o ð. Her skulu verða nevnd nøkur amboð, sum nýtt vórðu við leypasmíð, og sum hava nøvn eftir tí, og nøvnini eitt sindur ymiss í ymsum bygdum: 1. Smalt høggujarn at høgga hol og plógv í stuðlarnar; tað verður

kallað: *leypsjarn* (mynd 5 c), *leypajarn, leypsstuðlajarn* og *stuðlajarn*. 2. Navari at gera hol fyri nøglunum, kallaður: *leypsnavari* og *leypanavari*. 3. Serligur vinkul við tí halli, sum vegvaksni leypurin skuldi hava; hann varð kallaður *leypavinkul* (Ki.). – Har afturat hava teir so sjálvandi havt tey vanligu amboðini, ið nýtt verða til tílíkt smíð, t. d. høvil, sag, strikumát o. o.

Leypasmiðir. Tað vóru ikki allir menn, ið vóru *tað* hegnigir, at teir dugdu at smíða sær leyp sjálvir, men teir fleiru hava sjálvir gjørt sær leyp. – Hinir máttu tá heita á aðrar, ið betur dugdu. – Í summum bygdum hava tað verið einstakir menn, ella einstakur maður, ið leyparnar smíðaðu; summir hava eisini smíðað leypar til aðrar bygdir. Hetta hava so ofta verið menn, ið annars høvdu til starv, ella lutvíst starv, at fáast við træsmíð, t. d. húsasmiðir. – «Nú eru tað bert teir gomlu, ið duga at smíða ein leyp, og skal onkur av teimum yngru, ið handiligur er, royna tað, má hann hava ein gamlan at hyggja eftir» (Svk.). – Kent er tiltakið, at hann, ið dugdi at gera beinan leyp, dugdi at gera hús. – Dagsverk hjá gomlum haraldsundsmanni var at taka leyp úr 5/4 tumma borði. Men tað skuldu vera skjótastu smiðir, ið tað gjørdu, og langur mundi dagurin vera. –

Nú á døgum verða leypar gjørdir á maskinverkstaðnum, holini í stuðlarnar verða borað á maskinu, staðin fyri høgd, rimarnar sagaðar og hølvaðar á maskinu og oyruni á rimunum við. Og tá er eftir bert at seta saman (Mv.).

*Vinnusjúka.*

Nøkur vinnusjúka stendst ikki av at bera leyp. Maður kann bera merki eftir leypinum, t. d. kann hann fáa lagd niður í høvdi eftir fetlinum, og hendir seg runnar niður eftir rygginum á geislaangarnar, har sum leypurin liggur at, men hesi merki eru óhættilig. Tó hendir seg, at sovorðin runnur tekur illt fyri seg, tá ið húðin tekur av, men hann hevur líkindi at batna aftur sum annað sár. Og gevur

maðurin uppat at bera eitt skifti, hvørva hesi merki ofta, sum frá líður. — Summir vóru so hársárir, at teir toldu ikki fetil, tað var, sum ein varð royttur (He.). — Annað er, at maður undir leypi, sum í einum hvørjum arbeiði, kann ovtaka seg, ella vera fyri óhappi, snáva á, stíga óvæntað, ella fóturin kann glíða undan honum í hálku. Tá kann hann fáa mein, tí tað stendur nógv á manni undir fullum leypi. «Tí varð eisini lagt ungum fólki eina við, at eingin mátti órógva ella skúgva undir mann undir leypi, og enn minni tyngja niður á leypin aftan ífrá. Høvdið kundi fara av knóranum, varð sagt» (Kl.). — Hevði maður borið nógv, kundi taka av á rygginum ella lendunum, men so nýttu teir lendabelti, sum er eitt hosuleggald stappað við hoyggj ella ull og við bandi í hvørjum endanum bundið um miðjuna. Hetta var, umframt *lendabelti* kallað við ymsum øðrum nøvnum í ymsum bygdum: *leggald, leypaleggald, lendafetil* og pylsa. Hetta varð bert brúkt, tá ið borið varð nógv dag um dag, t. d. tøð, torv tara o. a.

Menn vórðu ikki bognir av at bera leyp; summir vilja halda, at hetta heldur hevur rætt ryggin. Men her kunnu eisini nevnast dømi um, at maður, ið hevur lagt ovnógv fyri seg sum ungur, er bognaður í rygginum. — «. . . Maðurin gjørdist bogin, og hann segði, at tað kom av bering. Pápin doyði, tá ið hann var ungur, og hann gjørdi sær *stóran* leyp at bera í. Hann gjørdist tí so kúlutur, at hann fekk ikki borið leyp meir. Hann gjørdi sær so trillubøru og koyrdi torvið eftir Landavegnum til hús» (T.).

Maður í Dali, sum hevði veikt høvd, og tí ikki toldi at bera undir fetli, gjørdi sær serligan leyp (mynd 5 a). Hann festi tvey trø í fetlasíðuna á leypinum, sum myndin sýnir, og hevði so hesi trøini á økslunum, tá ið hann bar leypin og helt hvørja hondina í sítt træið. Hetta var góð byrði, lá væl á bakinum, men *tað* tvørlig, at maðurin fekk ikki stoytt, mátti altíð seta frá sær fyrst. Hann kallaði tað at bera við [hārò]. — Tað hendi seg, at hetta varð nýtt (Skú.).

*Leypurin í fólkahuganum.*

Við tí miðstøðu leypurin hevur havt í arbeiðslívinum, hevur hann havt stórt rúm í fólkahuganum. Vit síggja tað í teim mongu orðtøkum, orðafellum og tiltøkum, – og í skaldskapi teirra gomlu: táttunum, har leypurin ógviliga ofta er uppií. – Í teim gomlu kvæðunum er hann vist ikki nevndur.

Tað er tí merkiligt, at huldufólk, sum í pátrúgv fólksins starvaðust á landi og sjógvi eins og kristnir menn, og høvdu neyt og seyð gangandi í haganum ímillum hini neytini og seyðin, høvdu bát standandi niðri á støðni saman við hinum bátunum, útróðrarreiðskap, snøri o. a., alt ósjónligt sjálvandi, – ikki høvdu leyp. Í hvussu er hevur høv. ikki verið varur við nakra søgn, ið sigur tað.

Í nútíðini hevur leypurin, sum so mangt annað gamalt, fingið ein romantiskan dám yvir seg. Vit síggja tað í pappírskurva- og pinkuleypunum, sum nevndir eru omanfyri. Eisini síggja vit tað í einum parti av søguskriving í nýggjari tíð, ikki minst í jólasøgunum, har leypurin hevur nógv størri pláss, enn hann verunliga hevur í lívinum hjá teim flestu. Og hvussu mongum jólabókum og jólaheftum í okkara tíð er kápumyndin ikki henda føroyska hugnamyndin: maður við torvleypi á baki, – ein mynd, sum fyri tí størra talinum av fólkinum er ókend úr livandi lívinum, og í næstu framtíð við vegum og bilum og øktari kol- og ravmagnsnýtslu, verður ókend fyri alt størri parti av fólkinum.

## SUMMARY

The above is the concluding account of the Faroese *leypur* – previous article in *Fróðskaparrit* 1955[7]) – and contains the following: 1. Measurements of the *leypur* in connection with other measures (*kannubæri, fimtingur* etc.), 2. The *leypur* in actual use.

1. The material available for this section is not so plentiful as could be wished and it seems that some of the tradition has been forgotten. The *byrðarleypur* is first dealt with because in spite of variations in size as between the various villages it is often used as a measure, e. g.

for peat, manure, corn (for drying), whalemeat, hay. Otherwise the volume of the *leypur* has been reckoned as a proportion of the *tunna* («barrel»), the *skeppa* (8 *skeppur* = 1 *t.*), the *kannubæri* (48 *kannubærar* = 1 *t.*) and the *fimtingur* (16 *fimtingar* = 1 *t.*) to which so many *leypur*-names bear witness. The *fimtingur* is only in use in Suðuroy and as a *leypur*-measure only in the villages of Hov and Sandvík.

2. To the question «What is the *leypur* used for?» one is tempted to answer «What is the *leypur* not used for?» The *leypur* has, indeed, followed the Faroeman in all his work on hill and shore, in the cliffs and out at sea. The *leypur* is borne on the back. It can also be carried by a pony; in the case a *leypur* hangs from each side of the animal. A man bearing a *leypur* uses a head band (see Figs. 3 and 4). The band is described, including the materials used, the various modes of fixing it, of tying the knot in it and of fastening it to the *leypur* (see Figs. 1 and 2).

The use of the *leypur* is described in connection with the following: peat, manure and seaweed, fish offal, corn, hay, wool, fish, whalemeat and in connection with work on the land incl. planting, in connection with fishing whether by line or net, when fowling in the cliffs, for carrying ice and snow, conveyance of goods and other articles of every sort, e. g. the belongings of priest, doctor or bailiff. But not only men, women and children have also borne the *leypur.* Peat and manure have in addition been carried on horseback. The chief use of the *leypur* will have been for peat, manure and seaweed, and fish.

A small number of tools are referred to which are used in making *leypar* and which are called after it. In some villages carpenters made most of the *leypar,* but on the whole every Faroeman knew how to make himself a *leypur.*

Even those who carry the *leypur* a great deal do not suffer from any special «occupational complaints», other than that a man can get a depression across his head from the band and prominences on the back, corresponding to the spines on his back from the *leypur* itself, but these are not dangerous. — The body does not become bent through carrying a *leypur.*

It is odd that the many tales relating to the *huldumenn* (invisible beings of human size) never — as far as the author knows — mention the *leypur,* especially since superstition had it that the *huldumenn* worked just like ordinary mortals, they had sheep and cattle, they fished from their boats etc., but had no *leypur.*

## BÓKMENTIR


1. Laug= og Vaartingsprotokol 1656–65, folio 175. Handrit á Føroya Landsskjalasavni, Tórshavn.
2. *Svabo, Jens Chr.*: Indberetninger indhentede paa en allernaadigst befalet Rejse i Færøe i Aarene 1781–82, handrit, p. 449 í avriti á Føroya Landsbókasavni, Tórshavn.
3. *Jirlow, Ragnar*: Bärmesen. Ett ålderdomligt bärredskap och dess utbredning. Ymer, Stockholm 1935, p. 227.
4. *av Skarði, Símun*: Nú er tíð at stoyta kertu til jóla. Jólaboð, Tórs=havn 1941, p. 7.
5. *Poulsen, Jóan Chr.*: Hestsøga, Tórshavn 1947, p. 38.
6. *Rasmussen, R.*: Sær er siður á landi, Tórshavn 1949, p. 15.
7. *av Skarði, Jóhannes*: Føroyski leypurin. Fróðskaparrit, Tórshavn 1955, p. 32–60.
8. *Rasmussen, Holger*: Korntørring og =Tærskning på Færøerne. Kuml, Århus 1955, p. 139.